LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Starvs- og persónsprofilur til løgmansstjórastarvið í Løgmansskrivstovuni mai 2021

Hesin starvs- og persónsprofilur fevnir um niðanfyri nevndu tættir:


1. Kunning
2. Setanartreytir
3. Løgmansstjórin
4. Løgmansskrivstovan
5. Felags virðisgrundarlag
6. Persónsprofilur
7. Meting av umsøkjarunum
8. Tíðarætlan
9. Eftir setanina

# Kunning

Løgmansstjórin fer frá vegna aldur 1. august 2021 eftir at hava røkt starvið í 25 ár. Tí verður lýst eftir nýggjum løgmansstjóra.

## 1. Setanartreytir

Starvið er tænastumannastarv. Starvsheitið er løgmansstjóri og er flokkað í 40. lønarflokki hjá Felag Tænastumanna Landsins (í løtuni kr. 68.195,76 um mánaðin). Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 5.825,65 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Tilsamans er lønin kr. 74.021,41 um mánaðin umframt frítíðarískoyti (1,5 %). Tey fyrstu 2 árini eru at rokna sum royndarár.

Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, stovnar undir tí og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan.

## 2. Løgmansstjórin

Starvið sum løgmansstjóri fevnir í høvuðsheitinum um trý øki:

- mótvegis løgmanni,
- mótvegis Løgmansskrivstovuni, og
- mótvegis øðrum aðalstjórum

Mótvegis løgmanni

Løgmansstjórin er fremsti ráðgevi løgmans og skal tryggja, at hann fær fyrisitingarliga og praktiska hjálp til at útinna løgmansembætið á fullgóðan og lógligan hátt. Tað fevnir m.a. um at ráðgeva, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot løgmans til veruleika.

Løgmansstjórin er fastur skrivari løgmans á politiskum og formligum landsstýrisfundum.

Harumframt skal løgmansstjórin tryggja og gera sítt til:

- at gerandisdagur løgmans er skipaður so væl sum til ber, og at hann er væl fyrireikaður til teir fundir og tiltøk, sum hann tekur lut í,
- at hansara fyrisiting er væl virkandi og professionel,
- at samskipanin og uppfylgingin tvørtur um stjórnarráð er so góð sum gjørligt,
- at politikkurin hjá samgonguni er hongur so væl saman sum gjørligt,
- at samlaða landsfyrisitingin yvirskipað er vælvirkandi, og
- at eftirlitið hjá løgmanni við, at landsstýrisfólkini fyrisita teirra málsøki á fullgóðan og lógligan hátt, er nøktandi.

Mótvegis Løgmansskrivstovuni

Løgmansstjórin stjórnar Løgmansskrivstovuna, sum er fyrisiting løgmans. Sum stjóri skal løgmansstjórin m.a.:

- leiða og samskipa arbeiðið,
- tryggja, at fyrisitingarligu og umsitingarligu uppgávurnar verða framdar á ein hollan og lógligan hátt,
- fáa starvsfólkini í Løgmansskrivstovuni at mennast og trívast, og

- tryggja, at førleikarnir hjá starvsfólkunum eru á høgum stigi og koma løgmanni til góðar í teimum málum, sum løgmaður raðfestir og hevur skyldu at taka sær av

Harumframt eru ein røð av øðrum uppgávur, sum hoyra einum stjóra til.

<u>Mótvegis øðrum stjórnarráðum og aðalstjórum</u>
Løgmansstjórin er fremstur millum líkafólk, nevniliga millum hinir aðalstjórarnir. Uppgávurnar mótvegis hinum aðalstjórunum/stjórnarráðunum eru m.a.:

- at samskipa og fylgja upp uppá høvuðsmálini í samgonguskjalinum,
- at tryggja eina vælvirkandi fyrisiting, bæði tá tað ræður um bygnað og ymsar felags loysnir tvørtur um stjórnarráðini,
- at virka fyri góðum samstarvi og savningarmegi millum stjórnarráðini, og
- at skipa fyri regluligum samskipanarfundum við aðalstjórarnar - sonevndar stjóraráðsfundir.

## 3. Løgmansskrivstovan

Løgmansskrivstovan er skipað í ritaratænastu, stjórnartænastu, lógartænastu og innanhýsis tænastur. Arbeiðslagið á Løgmansskrivstovuni er í stóran mun skipað so, at starvsfólkini arbeiða í toymum tvørtur um nevndu eindir.

Løgmansskrivstovan er eitt av 7 stjórnarráðum hjá landsstýrinum. Bygnaðurin hjá Løgmansskrivstovuni sær soleiðis út:



Arbeiðsøkini hjá Løgmansskrivstovuni eru hesi:

**Ritaratænasta**
Ritaratænastan er forskrivstova løgmans og løgmansstjórans. Ritaratænastan hevur eisini um hendi ráðgeving í dagligum politiskum málum og samskifti bæði innanhýsis og uttanhýsis. Harumframt er ábyrgdarøkið innanhýsis samskipan, protokol, røðuskriving og heimasíðurnar lms.fo og foroyalandsstyri.fo.

**Stjórnartænasta**
Stjórnartænastan situr fyri samskipan og uppfylging løgmans uppá tvørs av stjórnaráðunum. Stjórnartænastan umsitur landsstýrisfundir, løgmansfundir, stjóraráðsfundir, samgongufundir og annað virksemi, ið hevur við samskipan at gera. Harumframt er ábyrgdarøkið at standa fyri tvørvegis verkætlanum millum stjórnarráðini.

**Lógartænasta**
Lógartænastan hevur fakligu ábyrgdina av løgmálum, sum fevnir um lóggávu undir føroyskum málsræði og ríkislóggávu. Lógartænastan arbeiðir við at tryggja høga dygd á lógarøkinum hjá landinum, og hon eftirkannar í tí sambandi øll lógar- kunngerðaruppskot hjá landsstýrinum. Lógartænastan situr eisini fyri Kunngerðaportalinum og Lógasavninum.

**Innanhýsis tænastur**
Umsitingin situr fyri bókhaldi, roknskapi, fíggjarstýring, journal/skráseting, umsiting av ognum í Tinganesi, KT og politiskari upplýsing. Umsitingin hevur eisini ábyrgdina av HR- og starvsfólkamálum, telefonmóttøku og matstovu.

Í Løgmansskrivstovuni starvast í løtuni 18 starvsfólk.

Nærri kunning fæst um Løgmansskrivstovuna á heimasíðuni: www.lms.fo

Løgmansskrivstovan varðar av tveimum stovnum:

- Føroya Kærustovnur
  - Kærustovnurin er skrivstova hjá ymsum kærunevndum, sum viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum. Kærustovnurin er eisini skrivstova hjá nøkrum nevndum, sum ikki eru kærunevndir, sum t.d. høvuðsbarnaverndarnevndini og fjølmiðlanevndini. Kærustovnurin upplýsir málini og ger tilmæli til nevndirnar at taka avgerð útfrá. Ætlanir eru um at umskipa virksemið á Kærustovninum.
- Dátueftirlitið
  - Dátueftirlitið hevur sum fremstu uppgávu at umsita dátuverndarlógina. Arbeiðið fevnir um at kunna, ráðgeva og vegleiða, men eisini at kanna og hava eftirlit við, hvussu og hvar persónsupplýsingar verða viðgjørdir

## 4. Felags virðisgrundarlag

Landsfyrisitingin, t.e. Løgmansskrivstovan og stjórnarráðini, hava orðað hetta felags virðisgrundarlag at arbeiða út frá:

- Vit draga eina línu
- Vit seta skynsemi í hásæti
- Vit vilja vita

- Vit bróta slóð

At fáa virðisgrundarlagið implementerað í dagliga arbeiðið og samstarvinum millum stjórnarráðini er ein áhaldandi avbjóðing, ið ovastu leiðslurnar allatíðina mugu hava fyri eyga í teirra arbeiði og tiltøkum uppá tvørs av stjórnarráðunum. Grundarlagið er m.a. lýst nærri á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni https://www.lms.fo/fo/um-radid/ og https://www.lms.fo/fo/um-radid/stevnumid/

Løgmansstjórin og aðalstjórarnir taka regluliga lut í teirra leiðsluforum, sum nevnist stjóraráðið. Stjóraráðið samskipar m.a. arbeiðið tvørtur um ráðini í landsfyrisitingini og verður leitt av løgmansstjóranum.

## 5. Persónsprofilur

Góð leiðsla er ein avgerandi fyritreyt fyri, at fyrisitingin er nýskapandi og røkkur góðum úrslitum.

Løgmansstjórin hevur tilvísing til løgmann. Høvuðsuppgávan hjá løgmansstjóranum er at ráðgeva løgmanni og skapa úrslit við høgari fakligari góðsku í samstarvi við starvsfólkið. Harumframt skal løgmansstjórin samskipa millum stjórnarráðini umvegis aðalstjórarnar. Hann skal vera góður starvsfólkaleiðari, vera fakliga dugnaligur á breiða virkisøkinum hjá Løgmansskrivstovuni og skal vera heildar- og framtíðarsinnaður.

**Høvuðsuppgávan er at skapa úrslit við høgari fakligari dygd í samstarvi við síni starvsfólk og starvsfelagar í allari landsfyrisitingini. Hetta krevur at:**

**Tú ert fakliga dugnaligur innan virkisøkið hjá Løgmansskrivstovuni**

- tú hevur kunnleika til mál, arbeiðshátt, virkismentan og fakvitan hjá Løgmansskrivstovuni,
- tú hevur politiskt tev uttan at vera partapolitiskur og eina greiða fatan um, hvørjar skrivaðar og óskrivaðar reglur eiga at galda í eini politiskari fyrisiting,
- tú ert tænastuhugaður, og tú dugir at umgangast meiningarmyndarar, avgerðartakarar, viðskiftafólk og samstarvsfelagar,
- tú dugir væl at lesa støður, lurta eftir ábendingum og at taka avgerðir út frá hesum,
- tú dugir at fáa politikk landsstýrisins settan í verk,
- tú samskiftir greitt og væl, og
- tú hevur virðing og kunnleika til aðrar mentanir.

**Tú dugir at síggja heildina og ert framtíðarsinnaður**

- tú leggur dent á heildina og tekur støði í tí, sum tænir heildini best,
- tú dugir at samstarva og at netverka, og tú fremur tvørgangandi samstarv,
- tú hevur visjónir, tú hugsar strategiskt, og tú setur mál í rætta høpi,
- tú dugir at tillaga teg, tá ið umstøðurnar broytast, og tú setur æru í at vera fremstur í menningini,
- tú vísir virðing og álit, tú sært ymisleika sum eina styrki, og tú dugir at fáa tað besta burturúr dygdum hjá starvsfólkum, starvsfeløgum, samstarvspørtum og landsfyristingina sum heild, og

- tú tolir væl mótgongd, serliga tá tvídráttir koma orsaka av málum, ið tú ert partur í.

**Tú ert ein góður starvsfólkaleiðari**

- tú fremur arbeiðsgleði og motivatión hjá starvsfólkunum og skapar karmar fyri góðum arbeiðsviðurskiftum,
- tú fært starvsfólkini at virka í toymum, har ið øll í verki fremja settu málini,
- tú hevur innlit í evnini hjá starvsfólkunum, og tú leggur dent á, at teirra førleikar verða mentir í mun til teirra arbeiðsuppgávur,
- tú gevur starvsfólkinum rúmd at útinna verk sítt, og tú stuðlar teimum í teirra arbeiði,
- tú ert nærverandi og raðfestir samrøðuna við starvsfólkið,
- tú raðfestir og skapar eina javnvág millum uppgávur og tilfeingið á Løgmansskrivstovuni soleiðis, at starvsfólk kunnu finna eina javnvág millum arbeiði og privatlív,
- tú tekur ímóti og gevur erlig og uppbyggjandi skoðsmál, og
- tú tekur hond um trupulleikar og avbjóðingar, og tú torir at taka avgerðir, eisini hóast tær eru illa umtóktar.

## 6. Meting av umsøkjarunum

Ein setanarbólkur við umboðum úr landsfyrisitingini og uttanhýsis ráðgeva stendur fyri setanartilgongdini. Setanarbólkurin velur umsøkjarar til setanarsamrøðu. Setanarbólkurin metir um umsøkjararnar út frá fakligu, leiðsluligu og persónligu førleikunum sambært lýsingini og starvs- og persónsprofilinum, og út frá, hvussu mett verður, at persónurin hóskar til Løgmansskrivstovuna og uppgávur hennara (“organisational fit”).

Setanarbólkurin ger sínar lýsingar og tilmæli við støði í hesum grundarlagi:

- Tann skrivliga umsóknin
- Fyrra setanarsamrøðan
- Test(ir)
- Tilvísingarpersónar, sum umsøkjarin velur út millum sín leiðara, starvsfelagar og starvsfólk, ið setanarnevndin setir seg í samband við telefonisk
- Møguliga eina seinni setanarsamrøða

Tilmælið verður latið løgmanni. Løgmaður setir síðani starvið, eftir at hann hevur lagt sína ætlan fyri á landsstýrisfundi.

## 7. Tíðarætlan

Umsøkjarar eiga at upplýsa teldupostbústað, sum kvittan fyri móttøku av umsóknini verður send til. Gingið verður út frá, at hesin teldupostbústaður kann nýtast til framhaldandi samskifti í trúnaði millum umsøkjaran og Løgmansskrivstovuna/setanarbólkin í setanartilgongdini.

Vegleiðandi tíðarætlan:

- Í viku 19 (10. mai) lýsing verður latin almenninginum við freist 31. mai 2021.
- Í viku 23 (7. – 11. juni) verður støða tikin til, hvør verður kallað/-ur inn til setanarsamrøðu.

- Í viku 23 - 24 (7. – 18. juni) fara setanarsamrøður og test og møguligar uppgávur framdar.
- Í viku 24 og 25 (14. – 25. juni) samrøður við viðkomandi tilvísingarpersónar, møguligar seinnu setanarsamrøður verða hildar og setanarbólkurin latur løgmanni sítt endaligu lýsing og tilmæli um setanina.
- Í viku 26 (28. – 30. juni) avgerð um setanina.

## 8. Eftir setanina

Tann, sum fær starvið, fær bjóðað eina samrøðu, har umrøtt verður, hvussu tann setti kann fáa sparring o.a. fyri at koma væl í gongd í starvinum. Møguleiki er fyri at fáa fráfarandi løgmansstjóra, sum sparringspartnara í eitt nærri avtalað styttri tíðarskeið.

Umleið 3 mánaðir eftir, at nýggi løgmansstjórin er farin til verka, hevur løgmaður eina uppfylgjandi samrøðu fyri at meta um, hvussu komið er í gongd.